Munnligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Umlættingar- og dagtilboð í summarfrítíðini

Spurningar:

1. Hví steingja umlættingar- og dagtilboð hjá Almannaverkinum í tríggjar vikur hvørt summar?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at játta neyðuga peningin til, at tilboðini kunnu vera tøk í summarfrítíðini hjá teimum, sum hava tørv á tilboðunum?

Viðmerkingar:
Fleiri familjur verða raktar av, at Almannaverkið sparir umlættingar- og dagtilboðini burtur í summarfrítíðini. Hetta ger, at tað verður trupult at fáa gerandisdagin at hanga saman. Tey avvarðandi eru hart sperd og hava tørv á umlætting alt árið fyri at røkja sínar skyldur. Hava tey ikki tað, verða tey noydd til at fara av arbeiðsmarknaðinum í eina tíð, sum kann vera sálarliga og fíggjarliga krevjandi.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin upplýsti í august í fjør, at ein meirjáttan á 5 mió. kr. skal til, um hesi tilboðini skulu vera tøk alt árið. Tá fevnir játtanin eisini um økta umlætting til borgarar við demenssjúku og umlætting til borgarar, sum standa á bíðilista.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 22. mars 2022

Djóni Nolsøe Joensen